## Kappróður hjá Knørri

Sunnudagin hevði Róðrarfelagið Knørrur fjórða umfar í vetrarkappingini síni, RK-prix. Hjá U15 vunnu Anna Louisa Rubek Nielsen og Sverri Skaalum Joensen, hjá U18 vunnu Gunnvá F. Ellingsgaard og Brestir Mikkelsen, og bólkin hjá vaksnum vunnu Johanna Petersen og Pætur Johansen. Seks umfør eru í kappingini. Næsta umfar verður sunnudagin, 28. februar. Til ber at síggja fleiri úrslit, støður og myndir á heimasíðuni hjá Róðrarfelagnum Knørri, http://www.rk.fo.



## Keita venur í Silkeborg

Á veg til Føroya leggur Keita leiðina framvið í Silkeborg, har hann skal royndarvenja í nakrar dagar. Tað skrivar heimasíðan hjá B68. Ahmed Keita hevur verið B68 ein sannur fongur, tey bæði árini, hann hevur spælt á Toftum. Tískil gleða tey seg eisini til, at hann og landsmaðurin Ndende koma aftur. Men áðrenn teir koma so langt, skal Keita venja við SAS-ligu felagnum Silkeborg, har føroyski landsliðsleikarin Christian Lamhauge Holst hevur sína dagligu gongd. Hvat henda royndarvenjing kann enda við, verður spennandi at fylgja, men heimasíðan hjá B68 skrivar, at Keita og Ndende, sum hava sáttmála við B68 í 2010, vera aftur á Toftum.

# Frá 1.000 pundum til 80 mió pund

### Nógv er hent í prísleguni í altjóða fótbólti síðani fyrsta prísmetið var sett afturi í 1905




Heri Simonsen

Tá Alf Common skrivaði undir ein sáttmála við Middlesbrough, sum var verdur 1.000 bretsk pund afturi í 1905, var tað ein prísur sum skelkaði mong. Men høvdu langabbarnir og oldurabbarnir hjá teimum, sum spæla í Premier League í dag, vita hvat teirra eftirkomarar fáa í løn, so høvdu teir fingið ein skelk uttan sín líka.

Vit hava prentað eitt yvirlit, sum vísir hvussu nógv príslegan er broytt frá tí, at Alf Common fór úr Sunderland til Middlesbrough fyri 1.000 bretsk pund - sum tá var met - til Christiano Ronaldo, sum í summar fór til Real Madrid fyri 80.000.000 bretsk pund, og harvið setti nýtt prísmet.

Yvirlitið vísir prísmetini, sum eru sett seinastu øldina í samband við, at spælarar hava skrivað sáttmála við eitt nýtt fótbóltsfelag.



Cristiano Ronaldo gjørdist í fjør heimsins dýrasti fótbóltsspælari, tá hann skifti úr Manchester United til Real Madrid fyri 80 milliónir ensk pund. Innsetta myndin vísir Alf Common, sum í 1905 gjørdist heimsins dýrasta spælari Mynd: Polfoto

### Teir dýrastu

| Ár | Spælari | Frá felag Til felag | Upphædd |
|---|---|---|---|
| 1905 | Alf Common | Sunderland= Middlesbrough | £ 1.000 |
| 1922 | Syd Puddefoot | West Ham= Falkirk | £ 5.000 |
| 1922 | Warney Cresswell | South Shields=Sunderland | £ 5.500 |
| 1928 | David Jack | Bolton=Arsenal | £ 10.890 |
| 1932 | Bernabe Ferreyra | Tigre BA=River Plate | £ 23.000 |
| 1952 | Hans Jeppson | Atalanta=Napoli | £ 52.000 |
| 1954 | Juan Schiaffino | Penarol=Milan | £ 72.000 |
| 1957 | Omar Sivori | River Plate=Juventus | £ 93.000 |
| 1961 | Luiz Suarez | Barcelona=Inter | £ 152.000 |
| 1963 | Angelo Sormani | Mantova=Roma | £ 250.000 |
| 1968 | Pietro Anastasi | Varese=Juventus | £ 500.000 |
| 1973 | Johann Cruyff | Ajax=Barcelona | £ 922.000 |
| 1975 | Guiseppe Savoldi | Bologna=Napoli | £ 1.200.000 |
| 1976 | Paolo Rossi | Juventus=Vicenza | £ 1.750.000 |
| 1982 | Diego Maradona | Boca Juniors=Barcelona | £ 3.000.000 |
| 1984 | Diego Maradona | Barcelona=Napoli | £ 5.000.000 |
| 1987 | Ruud Gullit | PSV Eindhoven=Milan | £ 6.000.000 |
| 1990 | Roberto Baggio | Fiorentina=Juventus | £8.000.000 |
| 1992 | Jean-Pierre Papin | Marseille=Milan | £ 10.000.000 |
| 1992 | Gianluca Vialli | Sampdoria=Juventus | £12.000.000 |
| 1992 | Gianluigi Lentini | Torino=Milan | £13.000.000 |
| 1996 | Alan Shearer | Blackburn=Newcastle | £15.000.000 |
| 1997 | Ronaldo | Barcelona=Inter | £ 19.500.000 |
| 1998 | Denilson | Sao Paulo=Real Betis | £ 21.500.000 |
| 1999 | Christian Vieri | Lazio=Inter | £ 32.000.000 |
| 2000 | Hernan Crespo | Parma=Lazio | £35.500.000 |
| 2000 | Luis Figo | Barcelona=Real Madrid | £ 37.000.000 |
| 2001 | Zinedine Zidane | Juventus=Real Madrid | £ 45.600.000 |
| 2009 | Kaka | Milan=Real Madrid | £ 56.000.000 |
| 2009 | Cristiano Ronaldo | Manchester United=Real Madrid | £ 80.000.000 |

# Klárt til hálvfinalur í Afrika

### Í gjárkvøldið spældu Nigeria og Egyptaland spælt seg í hálvfinalurnar í kappingini um afrikanska meistaraheitið, og harvið er klárt at fara undir hesar hósdagin




Rólant Waag Dam

Dysturin millum Nigeria og Zambia endaði við málleysum javnleiki. Longda leiktíðin førdi heldur einki við sær, annað enn eina útvísing til Apam hjá Nigeria. Tískil var neyðugt við brotssparkskapping, sum Nigeria vann 5-4.

Merkisvert var, at nigerianski málverjin Enyeama bjargaði seinastu royndini frá Zambia, áðrenn hann sjálvur skoraði avgerandi brotssparkið fyri Nigeria.

Hina fjórðingsfinaluna í dag vann Egyptaland 3-1 á Cameroon. Cameroon legði seg á odda, tá Hassan stútaði bóltin í egið net eftir hornaspark.

Sami Hassen javnaði stutt fyri hálvleik, men tá var tað málverjin Kameni hjá Cameroon, sum var óheppin og fór skeivur av skotinum.

1-1 var eisini støðan, tá dómarin bríkslaði eftir 90 minuttir. Bert tríggjar minuttir inn í longdu leiktíðini, sendi Gado Egyptaland á sigurskós, tá hann fangaði eina afturlegging frá Geremi og skoraði til 2-1.

Tríggjar minuttir eftir hetta var aftur galið. Hassan sendi eitt fríspark avstað, sum Kameni stýrdi upp undir tvørtræið, áðrenn bóltur støkk niður á milstrikuna og út.

Dómarin metti tó, at bólturin hevði verið innanvert málstrikuna og dømdi mál.

Harvið gjørdist sigurin veruleiki hjá Egyptalandi, og Cameroon staðfesti sína egnu vanlagnu í seinna hálvleiki av longdu leiktíðini, tá Chedjou varð vístur av vøllinum eftir eina neyðbremsu.



Obafemi Martins kom á vøllin, tá 70 minuttir vóru spældir

# Klaksvíkar á odda í billard

### Klaksvíkingar hava lagt seg klárt á odda í liðkappingini í billard, meðan tvøramenn eru aftastir

BILLARD
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Tað eru ikki bara fótbóltskvinnurnar í Klaksvík, sum vinna aftur og aftur, ár undan ári. Eisini tá ræður um billardítróttina eru klaksvíkingar teir bestu, tá kúlurnar rulla á grøna klæðinum. Soleiðis hevur verið í fleiri ár, og aftur í ár eru teir komnir best frá byrjan.

Føroyameistarakappingin í billard er umleið hálvrunnin og hevur KBF1 lagt seg á odda við 18 stigum. Havnar Klubbi er nr. 2 við 14 stigum, KBF2 og Mimir hava hvør síni 12 stig, og aftast er Tvøroyrar Billardfelag við 8 stigum. Øll liðini uttan KBF1 hava spælt 3 dystir. Oddaliðið hevur spælt 4 dystir.

Áhugaverdir dystir vórðu spældir seinasta vikuskifti, tá Mimir tók oddaliðið úr Klaksvík á bóli. Gomlu veteranarnir úr Mimi, Steinbjørn í Dali og Jan Müller vunnu tríggjar av fýra dystum móti elituspælarunum í Klaksvíkar Billardfelag, Halli Joensen og Sonhard Johannessen. Hetta úrslitið er við til at gera kappingina meira spennandi, tí Mimir hevur ligið í botninum higartil. Kortini skal nógv til fyri at hótta oddaliðið.

Klaksvíkin hevur tvey góð lið í kappingini, meðan hini feløgini hava hvør sítt lið. Á hinum liðnum hjá Klaksvíkar Billardfelag eru Kristian Sune Høgnesen og Torkil Jacobsen. Kristian Sune er fleirfalt føroyameistari og hevur eisini fingið fleiri góð úrslit í liðkappingini. Eisini Havnar Klubbi er vælmannað. Niels Nielsen er við aftur eftir ein steðg og vann hann saman við Jógvan Jørgensen tríggjar av fýra dystum móti Mimi herfyri.

### Støðan í billardkappingini er henda:

| Felag | Dystir | Eygu | Miðal | Stig |
|---|---|---|---|---|
| KBF1 | 4 | 6092 | 21,20 | 18 |
| HK | 3 | 4618 | 19,24 | 14 |
| KBF2 | 3 | 4608 | 19,20 | 12 |
| MIM | 3 | 4200 | 18,50 | 12 |
| TBF | 3 | 3406 | 14,20 | 8 |